LM-011/2025

Tvøroyri 30. july 2025

Løgmálamálaráðið

Gongin 7

Postrúm 377

FO-110 Tórshavn

Hoyringssvar til:

Uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión

Sterilisatiónslógin

Undirritaði er serlækni í urologi (nýru og kynsgøgnum hjá monnum).

Formæli

Fyriliggjandi uppskot er ein tiltrongd og kærkomin dagføring av galdandi lóg. Hóðast uppskotið í høvuðsheitum er væl tilevnað, kemst ikki undan einari kenslu av, at tíðarrákið og fakliga menningin longu hava yvirhálað fyriliggjandi uppskot.

Kastratión.

Serliga gevur tað undran, at kastratiónsparturin fær slíka rúmd og læknavísindaliga eina skeiva tilgongd, sum eg ynski at viðmerkja her.

Kastratión sum "viðgerð" fyri ikki likamliga sjúk, hevur verið nýtt langt upp í okkara tíð, sum viðgerð av pers. við óynsktum atburði, menningartarni, kynsbrotsverk, homoseksualitet, pædofili v. m.

Í hesum sambandi er talan um kirurgiska kastratión, við endamálið at taka burtur libito (kynstráðan) og nøringsevnini.

Sum nevnt í viðmerkingunum til uppskotið, er hetta eitt ógvusligt inntriv, har afturvendan ikki er møgulig.

Tann læknafrøðiliga menningin hevur givið okkum í hendi møguleika fyri medisinskari kastratión, sum er líka effektiv, hvat viðvíkir ynskta virkna, men ikki so inntrivandi. Haraftrat kemur effektivari

heilivágur/viðgerð innan psykiatriuna. Hetta hevur haft við sær, at kirurgisk kastratión fyri ikki likamliga sjúku í vesturheiminum stórt sæð ikki kemur fyri (uttan í samband við kynsskiftisviðgerð, sum ikki er umrøtt í uppskoti til verandi lóg).

Teoretiskt kundi hugsast, at kirurgisk kastratión kundi verið bjóða monnum við dómi fyri kynsbrotsverk, har mett verður, at hetta kann verða avgerandi fyri at vera slúsaður út í samfelagið aftur, uttan vanda fyri endurtøku av brotsgerð. Sjálvt í slíkum føri vil medisinsk/psykiatrisk viðgerð í dag verið tøk/nøktandi til endamálið.

Tað kann soleiðis tykjast undrunarvert, at man innan lógararbeiðið ger læknafaklligar ásetingar, sum ikki eru í tráð við galdandi læknafakliga verunleikan.

Viðmerking til § 19 og § 2: sterilisatión sum ikki krevur loyvi.

Ì framtíðarhøpi kann tað vera ivasamt at lógarfesta, at sterilisatión skal fara fram á sjúkrahúsi. Ein kann ímynda sær, í tilfeingistruplum tíðum, at hetta verður niðarliga raðfest. Vit tosa her um viðgerð, sum ikki er tengt at sjúku. Kann samanberast við kosmetiska plastikkirurgi og eygnasjúku, har fólk valfarta til privatklinikkir runt um í heiminum fyri at fáa viðgerð. Àtti at veri umhugsa at strika hesa lógargrein viðv. sterilisatión sum ikki krevur loyvi.

Eg eri ikki vitandi um, at sterilisatión er eitt tilboð innan almenna sjúkrahúsverkið í vesturheiminum. Havi sjálvur verið víða um á sjúkrahúsum í norðurlondum, har hendan viðgerð í praksis ikki verður framd, men fer fram uttan fyri almenna sjúkrahúsverkið.

Jóhan Petur Davidsen, yvirlækni

Serlækni í urologi og parenkymkirurgi

Suðuroyar sjúkrahús